# ÚTBJÓÐINGARTILFAR

# MYKINESLEIÐIN

## INNLEIÐING

Í 2006 varð Mykinesleiðin boðin út til privat felag at røkja. Síðani hevur leiðin verið røkt av Sp/f Mykines við M/S Brynhild, av samtakinum Sp/f Skúvadal og Sp/f Sightseeing við M/S Froy og M/S Silja Star og av Sp/f Mykines við M/B Jósup.

SSL bjóðar Mykinesleiðina út aftur frá 2018 at rokna. Leiðin verður boðin út at røkja í 3 ár, við møguleika at framleingja sáttmálan í 2 ár, t.v.s. til og við 2022.

Endamálið við útbjóðingini er at veita ferðafólki og fastbúgvandi eina góða og komfortabla siglingarfarleið til og úr Mykinesi.

Sáttmálaprísurin er kr. 300.000 um árið umframt inntøkur frá farma- og ferðaseðlasølu. Siglt verður í høvuðsheitum 2 túrar um dagin í 4 mánaðir um árið, sum er frá 1. mai til 31. august. Umframt hetta, verður eisini siglt í heystfrítíðini.

Talan er um ein nettosáttmála, har arbeiðstakarin fær allar farma- og ferðaseðlainntøkur, umframt nevnda sáttmálagjaldið á kr. 300.000 um árið frá SSL. Gjaldið verður goldið 1. juli hvørt árið. Fyrstu ferð 1. juli 2018.

Inntøkugrundarlagið fyri ferðaseðlar og farm hevur seinastu árini verið vaksandi, og var í 2017 umleið kr. 1.300.000. Høvuðsparturin av hesum er ferðaseðlar. SSL kann ikki ábyrgdast fyri, at inntøkugrundarlagið kann broytast fyri hetta útbjóðaða tíðarskeiðið.

## TREYTIR

### <u>Ferðaætlan</u>

Siglt verður við støði í ferðaætlanini 2018 (Fylgiskjal 1).

Sigldir verða 2 túrar um dagin, sum skulu liggja ímillum kl. 8.00 og kl. 19.00. Ein túrur verður roknaður frá Sørvág – Mykines – Sørvág. SSL kann av sínum eintingum broyta ferðaætlanina í sáttmálatíðarskeiðnum innan nevnda tíðarskeið á degnum. Aðrar broytingar verða gjørdar í samráð við tey, ið røkja siglingina.

Siglt verður til eina og hvørja tíð eftir galdandi ferðaætlan, uttan so at talan er um umstøður, ið arbeiðstakarin ikki fær vart seg fyri, og sum eru av heilt óvanligum slag (force majeure). Verkfall verður ikki roknað sum force majeure.

Um ein túrur verður avlýstur vegna veður e.l., hevur SSL møguleika fyri at seta annan túr inn uttan eykakostnað. Hetta er galdandi fyri alt ferðaætlanartíðarskeiðið á hvørjum ári. Samferðsludeildin á SSL skal fráboðast, tá túrur verður avlýstur.

Roknast má við eyka- og leigutúrum á øðrum leiðum hjá SSL. Hettar verður gjørt í samráð við Samferðsludeildina á SSL. SSL treytar sær at kunna leiga skipið í upp til 80 dagar. Kostnaður fyri hvønn leigudag er upp til kr. 9.000, alt eftir hvat SSL leið talan er um.

SSL og arbeiðstakari skulu hava árligan eftirmetingarfund við gjøgnumgongd av hagtølum v.m.

<u>Bílegging</u>

Á Mykinesleiðini er neyðugt at skipa flutningin við bílegging.

Mannagongdin fyri bílegging er í fylgiskjali 2.

<u>Upplýsing</u>

Arbeiðstakarin skal samskifta við SSL heimildarfólk í Mykinesi um veðurlíkindini. Skiparin skal kunna Samferðsludeildina á SSL.

Mannagongdin fyri upplýsing er í fylgiskjali 2.

<u>Ferðaseðlasøla og inntøkur</u>

Ferðafólk skulu rinda ferðaseðil eftir galdandi skipan hjá SSL.

Arbeiðstakarin hevur ábyrgdina av, at manningin hevur neyðugan kunnleika til billeteringina, soleiðis at hendan kann fara fram á ein skjótan og tryggan hátt.

Arbeiðstakarin hevur skyldu til at fylgja ásetingunum í galdandi ferðafólkateljingarskipan hjá SSL.

Allar ferðaseðlainntøkur tilfella arbeiðstakaranum (nettosáttmáli).

Einvegis ferðaseðlaprísirnir eru kr. 60,00 fyri vaksin, kr. 30,00 fyri børn og pensionistar, ið hava fastan bústað í Føroyum.

<u>Skip og trygd</u>

Skipið skal vera hóskandi til leiðina, og tey serligu atkomuviðurskiftini, ið gera seg galdandi á leiðini. Tey, ið bjóða, verða í tí sambandi biðin um at kanna eftir og tryggja sær, at skipið uttan hóvasták kann leggja at í Mykinesi.

Skipið skal í minsta lagi hava møguleika fyri at taka 40 ferðafólk, og lúka øll galdandi loyvir um ferðafólkaflutning.

Skipið og manning skal lúka øll krøv sambært galdandi lóggávu, so sum

- ISM – skipan
- Neyðug vinnubrøv fyri manning
- Siglingarloyvi til ferðafólkaflutning

Umframt hetta krevur SSL eisini, at skipið hevur teknað eina P&I-trygging fyri møguliga endurgjaldsábyrgd fyri skaða á farm ella ferðafólk.

SSL kann til eina og hvørja tíð koma umborð og kanna, um øll viðurskiftir eru í lagi.

Sum trygd fyri, at arbeiðstakarin lýkur sínar skyldur eftir sáttmálanum, verður ein bankaábyrgd á kr. 100.000,00 kravd. Ein standard orðing av bankaábyrgdini er viðløgd sum fylgiskjal 3. SSL kann herumframt seta krav um, at tann, ið bjóðar, dokumenterar – um neyðugt við eini bankaábyrgd – at viðkomandi hevur neyðuga fígging til skip og rakstur.

<u>Farmur</u>

Møguleiki skal vera fyri at flyta vanligan smáan farm hvønn túr, herímillum oljutunnur.

## SÁTTMÁLASKEIÐ OG REGULERINGAR

Sáttmálaskeiðið er 3 ár. Sáttmálin er galdandi fyri sigling árini 2018-20, við møguleika at framleingja í 2 ár afturat til og við 2022.

SSL kann av sínum eintingum framleingja sáttmálan í 2 ár, um SSL hevur boðað frá tí í seinasta lagi 3 mánaðar áðrenn, at sáttmálaskeiðið er liðugt. Sáttmálin er galdandi fyri sigling árini 2018 – 2020.

## AVROKNING

Árliga sáttmálagjaldið verður goldið einaferð um árið, sum er ásett til at verða 1. juli á hvørjum ári sær. Fyrsta árliga gjaldið í sáttmálaskeiðinum er 1. juli 2018, og er kr. 300.000.

## INNKOMNU BOÐINI

Henda tænasta er ikki mvg-skyldug søla sambært § 12, stk. 1, nr. f í meirvirðisgjaldslógini. Tað er treytað av, at skipið ikki er undir 5 GT.

Innkomnu boðini skulu innhalda fylgjandi:

- Sáttmálakostnað
- Viðløgdu trú og heiður váttan um falna skuld til tað almenna (fylgiskjal 4)
- Rakstrarætlan við fíggjarstøðu

Eisini skulu boðini innihalda nágreiniligar lýsingar av skipinum, sum skal nýtast til leiðina, saman við frágreiðing um skipan og røkt av leiðini.

Tey, ið bjóða, kunnu eisini koma við øðrum upplýsingum, ið eru ella kunnu verða viðkomandi fyri tænastustøðið á leiðini.

KRITERIUM FYRI VAL AV BOÐI

Tað verður gjørd ein heildarmeting av boðunum, sum koma inn. Tað verður gjørt fyri at finna fram til besta boðið.

Boðini verða í tí sambandi í høvuðsheitum mett út frá tænastustøðinum og trygdarviðurskiftum.

Sum nevnt í innleiðingini, so er endamálið við útbjóðingini at veita eina góða og komfortabla siglingarfarleið til og úr Mykinesi.

Tænastustøðið er serliga tengt at skipinum, sum skal nýtast til farleiðina. Tað verður í tí sambandi stórur dentur lagdur á skipið, har tað serliga verður tikið atlit til umstøður hjá ferðafólki umborð, herundir komfort og sanitet. Eisini viðurskifti sum hægst loyvda ferðafólkatal, siglingartíð og atkomuviðurskifti hava týdning.

Bert boð, við øllum loyvum hjáløgdum, verða viðgjørd.

FREIST V.M.

SSL tekur sær rætt til frítt at velja ímillum innkomnu boðini og rætt til ikki at taka av nøkrum boði.

Verður tikið av boði, verður viðlagda sáttmálauppskot (fylgiskjal 5) nýtt sum grundarlag.

Boðini skulu vera inni í seinasta lagi 1. februar 2018 kl. 12:00 hjá:

Strandfaraskip Landsins, Sjógøta 5, FO-800 Tvøroyri.

Spurningar kunnu sendast á teldupost til jpa@ssl.fo

Øll, sum bjóða, hava møguleika til at síggja allar spurningar og øll svar.

**Fylgiskjal 1**

**Summar 2018**

| 36 SØRVÁGUR - MYKINES | | | |
|---|---|---|---|
| | **Úr Sørvági** | **Úr Mykinesi** | **Bussamband** |
| **x67** | 10.20 | 11.05 | Úr Tórshavn kl. 09.05 |
| **x67** | 16.20 | 17.05 | Úr Sørvági kl. 18.20 |

Siglingartíð: 45 min.

**Heystfrítíðin 2018, 13/10 - 21/10**

| 36 SØRVÁGUR - MYKINES | |
|---|---|
| Um viðrar verður siglt til og úr Mykines í heystfrítíðini | |
| **Í heystfrítíðini verður siglt úr Sørvági** | 10.20 |

Siglingartíð: 45 min.

Fráfaringartíðirnar úr Mykinesi kunnu verða broyttar munandi av veðri og streymi

Opið má.-frí. kl. 08.00 – 16.00. Leyg. og sun. stongt.

**Fylgiskjal 2**

***Mannagongd fyri bíleggingar á Mykinesleiðini***

1. Bílegging fer fram við at venda sær til arbeiðstakara.
2. Skiparin hevur skyldu til at kunna seg um veðurlíkindi hvønn morgun. Skiparin kunnar seg hjá avgreiðslumanninum í Mykinesi og boðar síðani Samferðsludeildini hjá SSL frá, um siglt verður ella ikki. Um ivaveður er, skal hetta eisini kunnast. Hendan kunning skal verða liðug, áðrenn kl. 08.15 á morgni.
3. Um avlýsingar ella broytingar eru, skal skiparin geva Samferðsludeildini boð, sum verða løgd inn á heimasíðuna.

Tað er ein treyt, at allir partar samstarva, soleiðis at kundin fær best møguligu tænastu.

**Fylgiskjal 3**

## Bankaábyrgd

| **Ábyrgdardebitor:** | **Ábyrgdarkreditor:** |
|---|---|
| ______________________ | **Strandfaraskip Landsins** |
| ______________________ | **Postsmoga 30** |
| | **810 Tvøroyri** |
| ______________________ | |

---

Arbeiðstøkan er rakstur av Mykinesleiðini í tíðarskeiðinum frá 1. mars 2018 til 31. desember 2020. Strandfaraskip Landsins kann av sínum eintingum leingja sáttmálatíðarskeiðið fram til 31. desember 2022.

Sáttmáladagfesting: / 2018

Í sambandi við omanfyri standandi og eftir áheitan frá ábyrgdardebitor, hevur ________________________ kr. 100.000,00, skrivað krónur eitthundraðtúsund 00/100, tøkar fyri Strandfaraskip Landsins sum ábyrgd fyri Strandfaraskip Landsins, um so verður at arbeiðstakarin ikki heldur sínar skyldur eftir sáttmálanum um rakstur av Mykines leiðini.

Endamálið við ábyrgdini er at rinda øll krøv, sum Strandfaraskip Landsins kann fáa í sambandi við sáttmálaviðurskiftini.

Ábyrgdin heldur uppat tríggjar mánaðar eftir sáttmálatíðarskeiðið, uttan so at Strandfaraskip Landsins frammanundan skrivliga fráboðar arbeiðstakaranum, at krøv verða sett fram í sambandi við ábyrgdin. Um so verður, heldur ábyrgdin uppat, tá ið mishaldið er komið í rætt lag.

Strandfaraskip Landsins kann slaka viðvíkjandi skyldunum hjá arbeiðstakaranum, uttan at tað hevur ávirkan á ábyrgdina.

Ábyrgdin verður at leysgeva til Strandfaraskip Landsins eftir áheitan frá Strandfaraskip Landsins, uttan at Strandfaraskip Landsins kann ella skal dokumentera sín rætt við semju, endaligum dómi, dómsúrsliti ella gerðarættarúrskurði. Rindan av ábyrgdini skal eftir áheitan frá Strandfaraskip Landsins verða í seinasta lagi 5 arbeiðsdagar eftir, at ein skrivlig áheitan er komin fram.

Tá ið ábyrgdin fellur burtur, skal hendan ábyrgdarváttan latast aftur til

______________________

Undirskrift: ______________________

**Fylgiskjal 4**

**Skuldarváttan**

**Strandfaraskip Landsins**

## Trú og heiður váttan
**um ikki at hava falna skuld til tað almenna**

Samsvarandi ásetingunum í løgtingslóg nr. 98 frá 20. juni 1995 um at avmarka møguleikan hjá skuldarum at taka lut í útbjóðingum hjá tí almenna, skal tann, ið bjóðar, vátta við trú og heiður at hann ikki hevur falna skuld til tað almenna.

Boðsgevari: -

______________________________________________________________________

váttar við hesum við trú og heiður ikki at hava falna skuld til tað almenna.

______________________________________________________________________

Dagfesting Undirskrift

## Um fallin skuld er til tað almenna

Skuldarupphæddin er kr.________________________

skrivað krónur ____________________________________________________

Boðsgevari:

______________________________________________________________________

Váttar við hesum uppá trú og heiður einans at hava omanfyri standandi upphædd sum falna skuld til tað almenna.

______________________________________________________________________

Dagfesting Undirskrift

**Fylgiskjal 5**

# Avtala

# um

# Mykinesleiðina

Millum undirritaða

Strandfaraskip Landsins
Sjógøta 5
800 Tvøroya
(hereftir nevnt SSL)

og medundirritaða

***
(hereftir nevndur arbeiðstakarin)

(undir einum nevndir partarnir) er í dag gjørdur hendan avtala um rakstur av Mykinesleiðini undir fylgjandi ásetingum:

Endamál v.m

§ 1. Hendan avtalan er ímillum SSL og *** (hereftir nevndur arbeiðstakarin) um raksturin av Mykinesleiðini.

SSL skal í øllum sáttmálatíðarskeiðinum fáa samband við arbeiðstakaran og møguleiki skal eisini verða fyri at hava teldubrævasamskifti við arbeiðstakaran.

SSL hevur rætt til at hava eftirlit við, at arbeiðstakarin lýkur ásetingarnar í sáttmálanum, herundir við at kannað skipið. Eftirlitið frítekur ikki arbeiðstakaran fyri ábyrgdina av, at skipið lýkur ásettu treytirnar og at raksturin av leiðini verður útintur sum ásett.

SSL hevur rætt til at leggja skipið uttan ávaring, um SSL metir, at talan er um misrøkt. Eisini verður Skipaeftirlitið fráboðað í slíkum føri.

Tað áliggur arbeiðstakaranum beinanvegin at senda SSL avrit av øllum samskifti við almennar myndugleikar, ferðandi og onnur í sambandi við skipið og leiðina sum heild.

Tað er ikki loyvt arbeiðstakaranum at hava lýsingar á skipinum í sáttmálatíðarskeiðinum uttan við skrivligum loyvi frá SSL.

Kunningartilfar, ið verður útvegað av SSL, skal setast upp umborð á skipinum og útflýggjast ferðafólkum í samsvar við vegleiðingar, sum SSL ásetur. Annað kunningartilfar skal ikki útflýggjast ferðafólkum í sáttmálaskeiðinum uttan við skrivligum loyvi frá SSL.

Ferðafólkaflutningur

§ 2. Hendan avtalan umfatar skipið "***" av slagnum *** (hereftir nevndur skipið), sum arbeiðstakarin umsitur og sum skal røkja ferðasambandið á Mykinesarleiðini.

*Stk. 2:* Arbeiðstakarin hevur skyldu til at halda skipið í rakstrargóðum og ferðafólkavinarligum standi, samstundis sum trygdin verður sett í hásætið.

Eisini skal skipið vera í reinum og vælhildnum standi og reingerast innan og uttan í minsta lagið eina ferð um dagin. Skipið skal høvuðsreingerast annanhvønn mánað.

Tænastuferð skipsins er *** míl, og skipið og umstøður eru sum vístar á tekning, sum báðir partar hava undirskrivað.

*Stk. 3:* Arbeiðstakarin ber ábyrgdina av, at leiðin verður røkt um ásett uttan so, at leiðin verður forðað av veðrinum ella øðrum viðurskiftum, sum arbeiðstakarin ikki kann hava ábyrgdina fyri ella bøta um og sum má metast sum nakað heilt óvanligt fyribyrgdi (force majeure). Verkfall verður ikki mett sum force majeure.

Um skipið fær skaða ella líknandi, sum ger, at tað ikki kann røkja sínar skyldur mótvegis SSL, so hevur arbeiðstakarin skyldu til at útvega annað hóskandi skip innan 36 tímar frá tí, at ein møguligur skaði ella líknandi er hendur.

Verður skipið ikki sett aftur í sigling innan 5 samdøgur, eftir skipið er farin úr sigling, og um partarnir ikki kunnu semjast um, hvat víðari hendir, so kann SSL uppsiga sáttmálan uttan ávaring.

*Stk. 4:* Arbeiðstakarin kann ikki lata annan arbeiðstakara yvirtaka siglingina, uttan at hetta er góðkent av SSL frammanundan.

*Stk. 5:* Arbeiðstakarin skal nýta tey vanligu atløguplássini í Sørvági og úti í Mykinesi, og hevur arbeiðstakarin eisini skyldu at tryggja sær, at hesi pláss eru tøk til endamálið.

*Stk. 6:* Siglt verður eftir galdandi ferðaætlan. Um ein túrur ikki verður sigldur fyri veður ella líknandi, kann SSL seta hendan túr inn eina aðra tíð uttan eykakostnað. Tó kann SSL ikki seta meir enn tveir túrar inn um vikuna, sum verða avlýstir fyri veður ella líknandi.

Er tørvur á eykatúrum, skal hetta gerast í samráð við SSL. Arbeiðstakarin kann ikki frásiga sær at sigla eykatúrar, sum eru tilrættalagdir og fráboðaðir 36 tímar frammanundan.

Um SSL ikki eigur nakran túr til góðar sambært § 2, stk. 6 (1), rindar SSL kr. *** til arbeiðstakaran. Arbeiðstakarin sendir SSL rokning hesum viðvíkjandi.

*Stk. 7:* Mannagongdir í sambandi við bílegging, fráboðan, ferðaseðlar og billeteringsskipan eru vístar til í fylgiskjali 2.

Arbeiðstakarin hevur ábyrgdina av, at starvsfólk arbeiðstakarans til eina og hvørja tíð hava hollan kunnleika til hesar mannagongdir.

*Stk. 8:* Arbeiðstakarin hevur skyldu til at vísa ferðafólkavinarligan hugburð og góðan sjómansskap.

Starvsfólk arbeiðstakarans skulu vera í búna og annars vera nosslig og tignarlig.

SSL kann krevja, at arbeiðstakarin ikki nýtir starvsfólk, um viðkomandi ferð eftir ferð hevur verið orsøk til grundaðar klagur.

Fíggjarviðurskifti

§ 3. SSL rindar arbeiðstakaranum eitt árligt gjald á kr. *** og verður goldið fyrstu ferð 1. juli 2018, og aftaná við eins árligum millumbili til øll gjøldini eru goldin (t.v.s. fyri árini 2018, 2019 og 2020).

Gildiskoma

§ 4. Hendan avtalan er galdandi fyri trý tíðarskeið frá 1. mai 2018 til 31. august 2018, 1. mai 2019 til 31. august 2019 og 1. mai 2020 til 31. august 2020. Umframt hetta, verður eisini siglt í heystfrítíðini øll árini.

SSL kann av sínum eintingum framleingja sáttmálan í 2 ár, um SSL hevur boðað frá tí í seinasta lagi 3 mánaðar áðrenn, at sáttmálaskeiðið er liðugt.

*Stk.2:* Ein av pørtunum kann slíta sáttmálan heilt ella lutvíst, um hin parturin ger seg skyldugan í einum grovum broti ella ferð eftir ferð brýtur ásetingarnar í sáttmálanum.

SSL kann eisini uppsiga sáttmálan heilt ella lutvíst við 4 vikurs freist, um arbeiðstakarin ger seg skyldugan í øðrum viðurskiftum, sum gevur SSL grund fyri at meta, at arbeiðstakarin ikki framyvir fer at røkja leiðina nøktandi.

*Stk. 3:* Um mishaldið ikki er soleiðis, at tað gevur grundarlag fyri uppsøgn, men mishaldið hóast tað er til ampa fyri ferðafólk ella SSL ella viðvirkandi til, at skyldur arbeiðstakarans eftir sáttmálanum ikki eru hildnar, hevur SSL rætt til at mótroknað kr. 500,00 pr. brot fyri hvønn dag, sum skyldurnar ikki eru hildnar.

Mótrokning í gjaldinum verður fráboðað skrivligt og er ikki treytað av, at SSL kann dokumenterað nakað tap.

Mótrokning frítekur ikki arbeiðstakaran fyri at fáa viðurskiftini í rættlag. Fær arbeiðstakarin ikki viðurskiftini í rættlag uttan óneyðugt drál, má hann tola framhaldandi mótrokning, umframt at SSL hevur rætt til at slíta sáttmálan.

§ 5. Møgulig ósemja um tulking av hesum sáttmála ella útinning av hesum verður endaliga at avgera við gerðarrættarmáli, har hvør partur velur sín gerðarrættarlim, meðan Sorinskrivarin verður formaður.

Aðramáta er "Lov om Voldgift" galdandi, og er úrskurður gerðarrættarsins endaligur og kann ikki verða lagdur fyri vanligu dómstólarnar.

Tvøroyri, tann / 2018

Fyri Strandfaraskip Landsins: Fyri arbeiðstakaran:

______________________________ ______________________________